# Deja Vu spælir á nýggjar streingir

**Tónleikabólkurin, Deja Vu, letur fríggjadagin upp myndaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Talan er um umleið 200 stemningsmyndir, sum teir hava tikið seinastu tíðina**



*Teir fýra, Flóvin, Líggjas, Rógvi og Rúni, í tónleikabólkinum Dejva Vu, lata fríggjadagin upp myndaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

MYNDAFRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Teir gjørdust nummar tvey til Prix Føroyar í 2003, og síðani tá hava teir verið eitt heitt navn innan føroyska tónleikaheimin. Og tað er eisini innan tónleikin, teir eru mest kendir. Men fríggjadagin leitar tónleikabólkurin Deja Vu á heilt nýggjar leiðir, tí tá lata teir upp eina myndaframsýning. Ein myndaframsýning við umleið 200 stemningsmyndum fer í fimm dagar at prýða veggirnar í Smiðjuni í Lítluvík.

### Fløga á gáttini

Ætlanin var upprunaliga, at myndaframsýningin skuldi vera samstundis við ta leingi væntaðu fløguútgávuna, men pengatrot hevur gjørt, at fløgan er vorðin seinkað.

– Vit ætla tó, at fløgan skal koma út í nærmastu framtíð, siga teir fýra í Deja Vu, Flóvin, Líggjas, Rógvi og Rúni, sum tó ikki vilja seta eitt neyvt dato á.

Fløgan er tískil á gáttini, men enn vantar ein stór peningaupphædd, og tí fáa teir ikki sett punktum á. Mestsum alt er upptikið, men enn manglar mixing og nakrar fáar innspælingar.

– Framsýningin er so ætlað at skapa ein stemning rundanum fløguna og tónleikin, verður greitt frá.

Umframt sjálvar myndirnar verða eisini myndaalbum, har tað ber til at síggja privatar myndir, sum teir hava tikið millum annað á ferð í Danmark.

– Okkum hevur altíð dámað væl at taka myndir, siga teir og leggja skemtandi afturat, at teir hava eitt motto, sum ljóðar, at »tað er týdningarmikið altíð at taka nógvar myndir«.

Tað fer eisini at vera møguligt at keypa myndir, um ein hevur til tess. Tær fara at liggja frá 200 krónum og uppeftir. Fløguhúsin skal vera eitt fotoalbum, sum lýsir stemningin í løgunum, men eru tær myndirnar ikki við á framsýningini. Bíðað verður við teimum til sjálv fløgan kemur út.

### Dent á góðsku

Leingi er tað, ið væl skal vera, verður tikið til. Og hetta er júst tað, ein kann seta í samband við fløguna hjá Deja Vu. Hon hevur leingi verið í væntu, men teir fýra í bólkinum leggja stóran dent á, at fløgan skal verða góðskugóð. So mugu pengarnir koma í aðru røð. Millum annað hava teir verið niðri í vælumtókta Lundgård Studio í Danmark og tikið upp, og tað kostar. Eisini skal navnframi Óli Poulsen mixa. Prísurin fyri at gera fløguna man fara at liggja millum 300 og 350.000 krónur, tá hon er liðug.

Teir ásanna eisini, at við myndaframsýningini skapa teir nakrar væntanir millum fólk um, at fløgan fer at koma út skjótt, og tað fer eisini at seta krøv til teir soleiðis, at teir fáa hana lidna so skjótt sum møguligt.

– Tað er strævið, at fløgan ikki kemur út, men vit vilja altso, at hon skal hava góðsku. Pengarnir skulu ikki verða ein forðing, siga teir, og vísa flennandi á, at tað er júst tað, sum pengarnir eru vorðnir.

Nú er tó myndafram-sýningin, sum tað snýr seg um, og letur hon upp fríggjadagin 21. januar. Saman við myndunum verður møguligt at hoyra ymisk tónleikabrot hjá bólkinum.

# Náttúrusápa upploysir alt

**Ein nýggj náttúrusápa verður í hesum døgum marknaðarførd í Føroyum. Oda Fuglø av Viðareiði, sum letur hesa søluna upp í Føroyum, sigur, at hetta eru sápur, sum kunnu nýtast til øll endamál – líka frá sjálvrøkt til alt gravskitið**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Oda Fuglø er kinesologur og hevur selt vørur við vitaminum, urtum og mineralum í yvir tríati ár. Hon hevur fingið eina kvinnu úr Eysturríki, sum hevur marknaðarført hesar vørurnar til Danmarkar, til Føroya at greiða frá vørunum. Kvinnan eitur Anja Tot, og hon fer eisini at greiða frá, hvussu føroyingar kunnu selja og keypa hesar áhugaverdu vørurnar, sum eru so umhvørvisvinarligar.

Oda greiðir frá, at vørurnar kunnu nýtast til sjálvrøkt og pleygu umframt húsliga reingerð. Hartil fáast vørur eisini til vanliga húð og hárrøkt og alt gravskitið.

Tað serliga við hesum vørunum er, at tað eru mineralir í teimum, sum gera, at tær sjálvar niðurbróta seg.

– Tað vil siga, at tað eru ongir kemiskir eftirvirkningar í náttúruni, tá vatnið verður tveitt burtur, sigur Oda Fuglø.

Um ein til dømis skal vaska eina steikipannu, so niðurbrýtur hetta evnið alt feittið so væl, at tað ikki er neyðugt at brúka heitt vatn. Tá tú so skolar hetta í vaskinum, reinsar hetta evnið samstundis avløbið. Nevnivert er eisini, at uppvaskievnið er so gott, at tað eisini kann nýtast til at skola til dømis grønmeti, áðrenn tað skal nýtast til matgerð. Onnur reingerðingsevni eru so til gólv og onnur endamál. Oda hevur sjálv verið umborð á skipum og roynt hesi evni á bæði olju og fiskaroðslu við góðum úrslitum.

Kremini og hárkurarnir, sum eisini eru at fáa, eru ikki bara vanlig húðrøkt, men kunnu eisini vera fyribyrgjandi. Tað vil siga, at mineralini í teimum niðurbróta allar sjúkar kyknur í húðini og fáa hana at síggja fríska út.

– Mineralini eru øll vistfrøðilig og innihalda antioxidantar, sum grøðir kroppin innanífrá og út, sigur Oda og leggur afturat, at ein onnur orsøk til, at vørurnar eru so góðar, er, at tær innihalda flauritir, sum er immunverja hjá blómum og urtum.

Framløgan í Føroyum er ein roynd upp á at gera vart við, at hesar vørurnar eisini kunnu keypast til Føroya, sum jú hevur eitt minni gott umdømi á sær, tá tað kemur til umhvørvismál. Marknaðaføringin av vørunum í Føroyum byrjaði 17. januar. Og tann 23. januar verður framløga á hotel Hafnia frá klokkan 13 til 17 og tann 24. januar í Øravík frá klokkan 15 til 20.

# 40 fólk missa arbeiði í laksi

**Fyrst í mars mánaði hevur Faroe Farming í Vági ongan alilaks eftir at taka, og tá missa 40 fólk arbeiðið**

ALIVINNA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur nógv verið at gjørt hjá Faroe Farming í Vági, men virksemið hjá felagnum steðgar mest sum upp um nakrar vikur.

– Vit hava umleið 1000 tons av laksi eftir at taka, og vit rokna við, at tað verður liðugt síðst í februar ella fyrst í mars, sigur Erhard Joensen, stjóri.

Eftir tað verður einki arbeiði til tey umleið 40 fólkini, sum hava arbeitt hjá alifelagnum, og tey mugu fara heim.

– Seinastu vikurnar hava vit havt nógv at gera, og øll fólkini hava verið mest sum fulla tíð til arbeiðis, men vit vita eisini, at tá laksurin á Hovsfirði er liðugur at taka, so er einki arbeiðið til teirra, sigur Erhard Joensen.

### Vóna og vænta

Tað var ein dyggur smeitur fyri suðuroyingar, tá ið Føroya Fiskavirking gjørdi av, at virkini í Vági og Hvalba skuldu latast aftur. Ta ferðina mistu 89 fólk arbeiðið, og heltvin av teimum vóru arbeiðspláss í Vági.

Hetta tal kann um hálvan annað mánað tvífaldast, tí tað má Faroe Farming gevast við sínum virksemi fyribils, tí eingin laksur verður eftir at taka.

– Vit hava ikki mist mótið og vilja gjarna seta útaftur, men vit vita ikki í løtuni, hvussu tað verður við tí. Fíggingarstovnarnir hava ikki rættiliga gjørt av, um teir vilja verða við, sigur Erhard Joensen.

Hann vónar tó, at Faroe Farming kann fara undir at seta fisk útaftur í hesum árinum, og at gongd síðani kann koma á alivirksemið aftur.